# 5. Skálaberg – eitt kag frameftir

REPORTASJA

*Jústinus Eidesgaard*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Sosialurin, Klaksvík:** - Nýggi Skálaberg gevur okkum heilt aðrar møguleikar enn undanfarni. Í dag kunnu vit fara beinleiðis til kundan áðrenn túr og spyrja hann hvat hann vil hava og síðan fer Skálaberg eftir tí vøru og góðskar júst hesa vøru umborð soleiðis sum kundin vil hava hana. Við gomlu trolarunum hava vit verið nógv meira bundnir av at fiska eina vøru, og síðan at finna keypara til hana, sigur Hanus Hansen, reiðari á nýggja Skálaberg.

Tað var toka, kjaftsvart í mjørka, tá nýggi Skálaberg kom inn í Leirvíksfjørð mánakvøldið um útvarpstíðina. So myrkt, at forvitnir leirvíkingar og spentir syðradalsmenn sóu púra einki og allíkavæl, so vistu teir, at eitt skip var har. Skemtisøgan um málningin hjá Mikkjal í Søldarfirði, Smiril í toku, fekk rættuliga meining, tí øll vistu, at skipið var har, hóast ongin sá nakað.

Úti á Pollinum vóru fleiri flótandi før samankomin at taka í móti Skálaberg. Millum teirra, við seglum, var stoltleikin hjá klaksvíkingum, gamli útróðrarbáturin Dragin úr Fuglafirði, sum nú nú er riggaður til segl og skal virka sum skúlaskip fyri ungar siglandi klaksvíkingar. Har var eisini árabátur frá fornminnisfelagnum, ein motorur og onkur kajak, men grønlendingin sá eg ongan. Og meðan øll bíðaðu, dagaði Skálaberg fram úr mjørkanum stórur og breiður og svartur og flaggskrýddur.




## Teir fimm Skálabergarnir

Tað er mánakvøld í Klaksvík og Kósabrúgvin er avtaklað við fólki, enn streyma fólk norður eftir, tey ganga sama veg. Tað er Kósabrúgvin, sum er karmurin fyri stórhendingina fyri framman. Niðri á brúnni verður prátað og prátið er um nýggja skipið og prátið flytir seg tíð. Næstan øll minnast, tá fjórði Skálaberg kom til landið í 1989. Tá legði hann eisini at her, og tá var eisini eins nógv samankomið. Nógv minnast eisini tá triði Skálaberg kom í 1976 og tey minnast eisini hátíðardámin tá. Og so er tað onnur, og nú fækkast tey, sum minnast tá næsti Skálaberg kom í desember 1956. Tað var sanniliga stórhending við lít og hann var hildin at vera eins stórt vágaverk og nýggi Skálaberg í dag. Og tað eru bara nøkur heilt fá, sum minnast fyrsta Skálaberg sum kom teir seinastu dagarnar í 1933. Ein sum minnist er Símun David Kalsøe, sum í dag er elligamal, yvir 90 og enn er heima og klárar seg sjálvan. Eg kenni kikaran hjá honum á mær og veit at hann kikar úr heiminum á Bumshamri, nú meðan Skálaberg leggur at. Símum David førdi Gamla Skálaberg saman við øðrum í fýratiárunum. Ella fugloyingurin Eliesar Sørensen niðanfyri Stengarvegin tætt her við. Hann er eisini elligamal og dulur, men minnið er sum í uglu og hann minnist væl fyrstu trolaratíðina í Klaksvík og luttók í henni. Ella bróðurin Pætur Franklin á Vistarheiminum, sum er líka gamal, hann situr helst við fullari skuffu og bíðar spentur eftir tí fimta Skálabergi, nú hann er givin at ganga so langar túrar sum norður á Kósina. Og bróðurin Mourits á Vistarheiminum veit eisini beskeð. Tað eru fleiri aðrir klaksvíkingar sum hava upplivað allar Skálabergarnar koma inn um Klakk.

## Kirkenes og Ukraine

Men nú snýr tað seg um nýggja Skálaberg. Tann seinasti er seldur til Grønlands og nú tosa klaksvíkingar um tann úr Kirkenes, ella tann úr Ukraine, har skrokkurin er smíðaður og hornorkestrið tekur í móti honum, meðan fagrar talur verða hildnar. Og alt verður gløgt eygleitt av Oliver Joensen, blaðstjóranum á lokala blaðnum Norðlýsinum, sum eisini var hjástatt, tá næsti, triði og fjórði Skálaberg kom til landið. Sera neyv frásøgn er í Norðlýsinum um tann næsta Skálaberg og um fiskiskapin hjá tí fyrsta.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri beyð skipinum vælkomið.

- Seinasta spildurnýggja fiskiskip, sum kom til Klaksvíkar, var fyri fimm árum síðan, tá Christian í Grótinum legði at bryggju her fyri fyrstu ferð og vit kunnu gleðast um tað góða úrslit, hann saman við hinum skipunum hevur lagt fyri dagin.

- Nógv er broytt síðan Jógvan Kjølbro og Christian Holm fyri sjeyti árum síðan tóku ódnartak við at keypa fyrsta Skálaberg. Tað vóru ikki so góðar tíðir tá ið vóru høvuðsorsøkin til keypið, nei, tað var trúgvin á framtíðina og at troyta nýggjar leiðir, sum eggjaðu til nýhugsan, og væl hevur roynst, segði Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri.

## Bjartskygdur reiðari

Reiðarin á Skálaberg, stjórin á JFK-Trol fekk eisini orðið, tá Skálaberg hevði lagt at. Hann kom við skipinum úr Noregi og talaði frá vonginum beint undir brúnni. Fyri okkum, sum stóðu niðri á brúnni, ljóðaði Hanus við síni djúpu rødd næstan sum ein rødd úr erva úr tokuni og tað var ein sannførdur reiðari, sum presenteraði skipið fyri klaksvíkingum.

- Tað er helst so, at onkur ivast um tað nú er rætt at fara undir at smíða nýggjan Skálaberg fyri so nógvan pening, góðar hálvt annað hundrað milliónir. Á summum økjum í samfelagnum eru útlitini ikki tey somu sum fyri 2-3 árum síðan. Tá við kortini eru komnir á Klaksvíkina við hesum nýggja fari, so er tað tí vit hava roynt at líta fram í tíðina. Vit hava roynt at bøtt um avmarkingar sum lógu í tí gamla bátinum. Maskinorkan er økt. Talið av spølum og trolum er vaksið. Til ber at nýta flótitrol. Frystiorkan er økt. Møguleikarnir at pakka vøruna í smápakning ella sum liðugtvøra eru eisini munandi bøttir.

- Vit hava lagt doyðin á at útvega okkum eitt so gott og fjølbroytt veiðiamboð sum á nakran hátt tilber. Tað sum Hin Alvaldi letir liva og nørast í Barentshavinum sær hampuliga væl út í løtuni. Fiskiloyvið í Irmingarhavinum hava vit eisini at dúva upp á. Rentustøðið í heiminum er eisini søguliga lágt, sjálvtum heimsbúskapurin kann tykjast ivasamur. Vit framtíðarmøguleikum í huga hava vit tikið hetta stig. Vit vita sjálvandi, at missa vit fiskirættindini, so verður tað tungur róður, segði Hanus Hansen.

## Eitt dreymaskip

Tú hevur veruliga kensluna av, at Skálaberg er eitt serligt skip, tá tú kemur umborð. Tað er hugsað um hvønn smálut. Innan er skipið snotiligari enn Norrøna. Har er pláss, har er ljóst og har er rúmligt. Sjónvarp er á kømurunum, wc og bað. Kømurini eru rúmlig einki er spart. Manningin hevur atgongd til internet.

- Vit hava rættuliga lagt okkum eftir at manningin skal trívast umborð. Onkur heldur hetta kanska vera oysl, men tær forbetringar vit hava gjørt, fyri at manningin skal trívast kosta minni enn eitt prosent av samlaða kostnaðinu, sigur Hanus Hansen, reiðari.

Vit hitta hann inni á skiparakamarinum nú tað ringasta nosið av vitjandi er av. Hann hevur næstan fingið gø í hondina av at taka í móti. Hanus er sjálvur gamal skipari. Hann var fyrstu ferð skipari í 1986 og fram til 96 var hann skipari á Enniberg, tey seinastu fýra árini samanhangandi.

Tann stóri munurin á hesum skipinum og á tí gamla er, at vit kunnu bjóða keyparanum tað hann ynskir. Eg veit at 165 milliónir eru nógvir pengar, men skuldi vit bygt ein trolara sama slag sum undanfarna Skálaberg, so hevði hesin kosta 125 milliónir og møguleikarnir høvdu verið teir somu, sum á tí gamla og tá er væl ikki talan um framstig. Ein triðingur av tí, sum teir gomlu trolararnir fiska fer í lastina, restin fer í havið aftur. Her hugsi eg um høvd og garnar og annað, sum ikki verður gagnnýtt av fiskinum. Við nýggja trolaranum hava vit nógv betri møguleika at gangnýta alt sum kemur á dekkið, sigur Hanus Joensen, reiðari.

## Brøður eru skiparar

Brøðurnir Róðin og Ólavur Biskopstø eru skiparar á nýggja Skálaberg. Teir eru klaksvíkingar og av trolaraætt. Langabbin, Mortan í Hvannasundi, var ein av pionerunum innan trolaravinnu í Føroyum, hann førdi eisini fyrsta Skálaberg. Fimm av synum hansara, sum allir eru ommubeiggjar hjá skiparabrøðrunum á Skálabergi í dag, mannaðu trolarabrúgvar í drúgvt tíðarskeið. Ommubeiggin Kaj Johannesen, førdi av og á tann fyrsta Skálaberg og tann næsta mest sum alla tíðina.

- Hetta skal ganga, er tað fyrsta Róðin sigur, tá eg spyrji um framtíðarvánirnar. Róðin er ikki sørt errin av skipinum. Tað er ikki tann minsti ivin at hóma hjá honum.

- Eg trúgvi, at rættuliga dygdin á hesum skipi kemur til sjóndar tá smáligur fiskiskapur er. Vit hava nógv betri møguleikar at fáa fisk, tá lítið er til enn gamli Skálaberg. Vit vera teir fyrstu sum fara at royna eftir toski við trítroli og tað verður spennandi at vita hvussu hetta fer at gangast.

## Varveita báðar trolararnar

Hanus Hansen er ikki í iva um, at sjálvt um nýggi Skálaberg saktans kundi fiska alla kvotuna eystanfyri, so fer reiðaríið at hava báðar trolararnar, eisini Sundaberg.

- Tað hevur allatíðina verið ætlanin, at báðir trolararnir skulu fiska eystan fyri og at Skálaberg skal í Irmingarhavið eftir kongafiski. Vit fara at finna veiðumøguleikar fyri Sundaberg, tá hann ikki er eystanfyri, men eg vil ikki ordiliga siga enn hvat hetta snýr seg um, tí endaligu samráðingarnar eru ikki lidnar enn, sigur Hanus Hansen, reiðari.



*Oliver, blaðstjóri á Norðlýsinum, eygleiddi meðan Skálaberg legði at, eins og undanmenn hansara gjørdu við teimum fyrstu Skálabergunum*



*Skiparabrøðurnir Ólavur og Róðin Biskopstø skulu skiftast at føra Skálaberg*



*Hanus Hansen, reiðari, í skiparastólinum. Hann er sjálvur gamal skipari*



*Tað eru alvorligar greiðir, tá teir fara at skaffa í hesi fínu stovuni*